# Menning av landi og fólki okkara í ríkisfelagskapinum eru aðalmál Sambandsfloksins

Val



**JOHAN DAHL**
Løgtingsmaður
Valevni Sambandsfloksins
til fólkatingsvalið

Vil tú hava umboðan á Fólkating , - sum bara hevur eitt aðalmál og tað er at niðurbróta ríkisfelagskapin og allar teir fyrimunir vit sum fólk og land hava við honum, og sáa illgresið - ja so er eitt at gera – vel Javnaðarflokkin ,Fólkaflokkin,Miðflokkin, Sjálvstýrisflokkin ella Tjóðveldi, tí hesar eru allir á einum málið um at fullveldið og sonenevndi frælsur felagskapur = loysing er loysnin.

Valið hjá tær er einfalt - vil tú hava ein ábyrgdarfullan flokk at umboða tíni og landsins áhugamál á fólktingið ,- ein flokk sum vil áhaldandi mennað hetta samfelag og fólkið her búleikast, so er sambandsflokkurin TÌN flokkur.

Sambandsflokkurin er TÌN TRYGD ,TÌN VERJA ,TÌN ábyrgdarfullað umboðan bæði her heima á løgtingið og í fólkatinginum.

Tí er umráðandi at vit fáa júst tína atkvøðu tann 13. Novembur.

# Nú gleið Sjúrður í egnum skarni

Val



**KARSTEN HANSEN**
Løgtingsmaður, Miðflokkurin
tlf. 285007

Á heimasíðuni hjá Tjóðveldi staðfestir Sjúrður við feitari skrift lygnir hjá Karsten Hansen. Hann sigur, at tað er lygn, at framsøgumaðurin hjá Tjóðveldinum, Finnur Helmsdal undir viðgerðini av løgtingsmáli nr. 41/2007 segði at hjúnarlagið var eitt stórt vandamál.

Finnur ikki bara segði tað, men hann grundgav eisini fyri tí. Hann vísti á teir mongu hjúnarskilnaðarnar sum vóru, og hvussu serliga børnini líðu undir hesum. Allar hesar trupulleikarnar slapp man undan, um hjúnarlagið ikki var.

Alt Føroya fólk kundi lurta, tí tað bleiv sagt fyri opnari mikrofon. Sjúrður og øll onnur kunnu fáa tað orðrætt á netinum.

Eisini sigur Sjúrður, at tað er lygn, at Høgni Hoydal skal hava sagt, at tað er neyðugt at fáa skrásett parlag upp á pláss, áðrenn vit taka fullveldi og trakka út í heim. Tíverri hevur hann sagt tað, og eg trúgvi, at hann og fleiri við honum meina tað.

Eg havi virðing fyri fólki sum ikki hava somu meining sum eg, tað harmar meg, at Sjúrður ikki virðir tey, sum hann er ósamdur við, men tað hevur hann jú loyvi til.

Góði Sjúrður eg veit at tú ikki frá foreldrunum hevur lært, helst móti betri vitan, at kalla fólk fyri lygnara.

# Finna skilagóðar loysnir á Fólkatingi

Val



**MAGNI LAKSÁFOSS**
Landsstýrismaður í fíggjarmálum

**Føroysk fólkatingsumboð eiga at súgva nýggja vitan, hugskot og loysnir til sín úr útheiminum, sum vit kunnu brúka skilagott til at møta avbjóðingum í Føroyum**

**Konstruktiv og mennandi umboð**

Skipanin, við at nøkur mál eru yvirtikin meðan onnur eru ríkismál, hevur við sær, at tað er ein sjálvsagdur rættur at Føroyar hava umboð í ríkistinginum har felagsmál verða umsitin. Tað er tí ein sjálvfylgja, at føroysku umboðini ikki kunnu vera – og heldur ikki eiga at vera – neutral í øllum málum, men eiga at hava ein konstruktivan og mennandi hugburð til arbeiðið á Fólkatingi, soleiðis at bæði Føroyar og felagsskapurin mennist av arbeiðinum.

Júst hugburðurin til arbeiðið á Fólkatingi er av stórum týdningi. Tú mást hava ein uppbyggjandi hugburð tá tú fert inn í samstarv, óansæð um talan er um Útnorðursamstarvið, Norðurlandaráðið, ES ella Ríkisfelagsskapin. Hugburðurin er avgerandi fyri tey úrslitini ið fáast burturúr og vísir eisini trúðvirðið yvir fyri tínum samstarvsfelagum. Sambandsflokkurin vil sjálvsagt vísa seg sum ein konstruktivan og álítandi samstarvsfelaga, har hann hevur umboð.

**Flyta loysnir til Føroya**

Føroyar eru í dag partur av altjóða samfelagnum, og vit hava á leið somu avbjóðingar og trupuleikar sum umheimurin. Hækkandi oljuprísur, vaksandi eldrabyrða og mangul uppá arbeiðsmegi eru dømir um felags trupulleikar í nógvum londum.

Okkara umboð á fólkatingi kunnu vera við til at síggja avbjóðingarnar fyri framman, hyggja at hvussu onnur lond hava valt at loysa trupulleikarnar, sortera millum tær loysnirnar londini hava valt, og vísa á hvørjar loysnir kunnu menna Føroyar.

Rák á Fólkatingi, Danmark, ES og aðrastaðni kunnu soleiðis á ein konstruktivan hátt nýtast til at menna politiska arbeiðið og lyfta støðið – eisini heima í Føroyum – og serliga um umboðini á fólkatingi eru at sær komin og hava røttu førleikarnar.

Tey fólkini hava vit í Sambandsflokkinum.

# Tín ótrygga trygd

Val



**KRISTIAN MAGNUSSEN**
løgtingslimur og valevni

Sambandsflokkurin sendir i hesum døgum bókling, við heitinum “Tín trygd”, í hvørt hús í landinum. Eftir sera ósambandsku og løgnu signalini teir hava sent út seinastu mánaðirnar, er hetta ein roynd at sissa fólk aftur.

Tjóðveldi hevur lagt eina ætlan, ið snýr seg um at draga sambandsflokkin upp á tráð. Væl er eydnast. Teir lokkaðu formannin í sambandsflokkinum at lova eina fólkaatkvøðu um loysing í 2012. Hann lovaði eisini, at hann vildi respektera avgerðina. Ein rættur sambandsmaður hevði stríðst til síðsta blóðsdropa ímóti slíkum ørskapi.

Tað er rættuliga ótrúligt, at sambandsflokkurin nú gongur á odda í ørskapinum, at øll politisk orka nú, enn einaferð, aftur skal brúkast til øsing um loysing, í staðin fyri at verða brúkt til búðnan realpolitikk.

Tann næsti sum fór í netið hjá hjá Høgna Hoydal, var nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum. Hann fær næstan ikki blund í eyguni, orsakað av skaðiligu ávirkanini, sum hann heldur, at blokkurin hevur á búskapin.

Nú sambandsflokkurin ber brenni á øsingarbálið hjá tjóðveldinum, og teir báðir ætla at trúlovast á fólkatingi, og síðan at giftast aftaná næsta løgtingsval, er betri lag aftur á tjóðveldinum, nú ongin, burtursæð frá miðflokkinumur, hevur tíma at spælt við teir í nøkur ár.

Øll vit, sum hava fólksins vælferð sum fremsta mál í øllum politiskum viðurskiftum,

mugu nú standa saman, eisini á fólkatingi. Ábyrgdarfullur politikkur snýr seg um at at varðveita og menna møguleikarnar hjá okkara ungdómi, at tryggja og menna vælvirkandi vælferðarskipanir hjá familjum og at tryggja og betra umstøðurnar hjá okkara eldri.

Tín vælferð og trivnaður, er grundarlagið undir politikkinum hjá okkum í javnaðarflokkinum, eisini tá talan er um ríkisrættarligu viðurskiftini, har vit altíð hava gingið á odda og hava víst á nýggjar og gongdar leiðir.

# Føroyar fyrst og fremst Danskur partapolitikkur í aðru røð

Val



**PETUR Í GONG**
Tjóðveldi

Nógvar ákoyringar hava verið á Tjóðveldið, tí vit ikki framman undan vilja binda okkum til ávísan blokk í donskum politikki. Men sjálvandi binda vit okkum ikki í óðum verki til nakran sum helst. Í Danmark er eingin flokkur, ið hevur føroyskt fullveldi sum endamál, meðan hetta er høvuðsendamálið hjá Tjóðveldinum. Tí er eingin ávísur danskur flokkur upplagdur samstarvsfelagi.

Tað kann eisini tykast í og so nasadjarvt av okkum føroyingum at fara á Fólkating at gera av fyri danir, hvørt teir skulu hava eitt høgra- ella vinstrastýri, ið vit ikki sjálvi skulu liva og virka í. Og samstundis havt í huga, at allir flokkar í Danmark eru um at rena saman á miðuni, kann tað vera líka mikið, um Danmark verður stýrt 5 stig til høgru ella 5 stig til vinstru.

Hetta førir til einastu skilagóðu niðurstøðu, ið mann kann koma til. Nevnliga, at okkara Fólkatingsumboðan skal brúkast til at røkja føroysk áhugamál aleina. Vit skulu ikki brúkara okkara Fólkatingsumboðan til at bjarga verðini undan kapitalistiskum heykum ella sosialistiskum rósum. Men bara fyri Føroyum. Sæð við Tjóðveldisbrillum sjálvandi.